Ein spurningur um tí›

Arbei›i› vi› n‡ggju fløguni hjá Torkil Mørkøre gjørdist óney›uga drúgt, tí stórur partur av upptøkunum fór fyri skjeyti

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

N‡ggj fløga vi› Torkil Mørkøre, gospelsangara úr Klaksvík, kemur á gøtuna í hesi vikuni.

Talan er um útgávu, har Torkil hevur gjørt sær stóran ómak vi› at fáa tónleik og sang at sita. Umframt at nakrir av fremstu tónleikarunum í Føroyum eru vi› á fløguni, eru upptøkur eisini gjørdar vi› virdum studiotónleikarum í USA.

– Eg havi í arbei›num vi› fløguni alla tí›ina lagt dent á, at gó›skan á útgávuni skal ver›a gó›. Eg havi ikki hug at leggja ein fløgu eftir meg, sum eg ikki eri nøgdur vi›, sigur Torkil Mørkøre.

Nógv gjørt burtur úr

N‡ggja fløgan kallast A Matter of Time, og á fløguni eru 10 sangir, sum Torkil Mørkøre hevur skriva›.

Umframt Torkil eru eisini tónleikarar sum Jan Zachariasen, Hans Poulsen, Gunnar Guttesen, Jákup Zachariasen og Regin Guttesen vi› á fløguni.

Torkil Mørkøre syngur á øllum sangunum, og afturat honum syngja eisini Laila Carlsen, Jónsvein Heinesen og Karl Johannesen. Nógv er gjørt burtur úr sangi og kórum.

Upptøkurnar eru gjørdar í Tennesee í USA og í JakZac Studio í Havn.

Upptøkur fórust

Arbei›i› vi› fløguni hjá Torkil Mørkøre byrja›i fyri f‡ra árum sí›ani. Ætlanin var, at fløgan skuldi koma út í fjør, men ikki fyrr enn nú er alt li›ugt. Ein orsøk til ta› er, at Torkil var› raktur av tekniskum trupulleikum.

– Tveir harddiskar vi› upptøkum, sum vóru gjørdar í Føroyum, fóru fyri skeyti, og vit máttu gera hesar upptøkur av n‡ggjum, sigur Torkil Mørkøre.

– Eg skuldi havt tiki› eitt kopi av upptøkunum, men ta› tykist, sum man hevur so stórt álit á teldunum – til ta› gongur gali›.

– Á fyrru upptøkunum var Niclas Johannesen nógv vi›, og tí vóru tær helst meira gittarmerktar enn seinnu upptøkurnar vór›u, heldur Torkil.

Andaligur bo›skapur

Tónleikaliga bakgrundin hjá Torkil Mørkøre er at finna í samkomuni í Betesda í Klaksvík, og bo›skapurin á n‡ggju fløguni er eisini grei›ur.

– Eg eri trúgvandi, og tí hevur andaligi bo›skapurin alt at siga. Eg havi roynt at gjørt nógv vi› tekstirnar, so fólk fáa naka› burtur úr teimum, sigur Torkil Mørkøre.

– Eg vóni, at fólk kunnu lurta eftir fløguni og fáa somu kensluna, sum tá tey lesa eina bók.

Fløgan hjá Torkil fæst nú kring alt landi›.

- Eg havi í arbei›num vi› fløguni alla tí›ina lagt dent á, at gó›skan á útgávuni skal ver›a gó›, sigur Torkil Mørkøre

Vónleyst at reka Sjómansheimi› ví›ari

Skuldin í Sjómansheiminum í Runavík er vor›in so stór, at ta› er vónleyst at fáa raksturin at bera seg. Tí var› Sjómansheimi› stongt sunnukvøldi›, og átta fólk send heim

AFTURLAT I ‹
Ey›un Klakstein

Sunnukvøldi› snara›i Sjómansheimi› í Runavík lykilin um.

Skuldin er vor›in so stór, at nevndin heldur ta› vera vónleyst at reka Sjómansheimi› ví›ari.

Nevndin fer nú at gera eina roynd at fáa eina loysn vi› kreditorarnar, men eydnast hetta ikki, fer Sjómansheimi› á húsagang.

– Vit kendu okkum noydd at steingja Sjómansheimi›, tí fíggjarligu trupulleikarnir bara vaksa, sigur Símun Pauli Berg, sum er í nevndini fyri Sjómansheimi› í Runavík.

Forma›urin í nevndin er farin frá, men hini tríggir nevndarlimirnir, sum eftir eru, fara at gera eina bjargingarroynd næstu vikurnar.

Tey átta fólkini, sum hava starvast á Sjómansheiminum í Runavík, eru farin heim. Sjómansheimi› var› stongt sunnukvøldi›, tí fíggjarligu trupulleikarnir bara vaksa

Átta fólk hava starvast á Sjómansheiminum, men tey eru nú farin heim.

Stór skuld

Sjómansheimi› í Runavík, sum er ein sjálveigandi stovnur, er umvælt og umbygt fyri nógvar pengar seinnu árini, og ta› hevur vi›fført eina stóra skuld í felagnum.

Sjómansheimi› skyldar Føroya Sparikassa hálvafimtu millión, men skuldin til leysar kreditorar er eisini stór, og ta› er serliga hendan skuld, sum for›ar fyri, at húsi› kann halda fram.

– Sjómansheimi› í Runavík klárar ikki at forrenta eina so stóra skuld, og tí er einki at gera uttan at lata aftur, sigur Símun Pauli Berg.

– Sparikassin hevur víst vælvild til at finna eina loysn, men treytin fyri ein var›andi loysn er sjálvandi, at vit fáa ein avtalu vi› hinar kreditorarnar eisini, sigur hann.

Símun Pauli Berg dugir ikki at meta um møguleikarnar fyri, at nevndin fer at koma á mál vi› bjargingarroyndini, sum nú ver›ur sett í verk.

Vóna at kunna lata uppaftur

Sjómansheimi› í Runavík er í sera gó›um standi eftir stóru umvælingarnar seinnu árini, men ta› nyttar líti›, tá húsi› ikki klárar at vinna nóg miki› av pengum.

Ov fá fer›afólk brúka Sjómansheimi› í Runavík, og tí eru inntøkurnar ikki nóg stórar at reka húsi› fyri.

– Nevndin byggir sína avger› um at steingja húsi› á fakta, og nú vóru vit komin í ta stø›u, at har var einki at gera, sigur Símun Pauli Berg, nevndarlimur.

Hann vónar, at Sjómansheimi› kann lata upp aftur tí›liga í komandi ári, men hann vil ikki meta um møguleikarnar fyri, at hetta kann lata seg gera.

Sjómansheimi› í Runavík hevur einki tilkn‡ti til Sjómansheimi› í Havn, hóast stjórin á Sjómansheiminum í Havn seinastu tí›ina hevur havt eftirlit vi› Sjómansheiminum í Runavík eisini. Hetta hevur hann bara gjørt, tí rá› vóru ikki til at hava eina lei›slu í Runavík.

Landsst‡ri› spælir huldumannaspæl

Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard fingu á uttanlandsnevndarfundinum fríggjadagin einki nærri at vita um sambandi› millum løgmann og danska forsætisrá›harran. Hesum finnast teir har›liga at í tí›indaskrivi

SJÁLVST†RISLEISTURIN
John Johannessen

Teir bá›ir formenninir fyri stóru andstø›uflokkarnar fingu ikki innlit í, hvat í løtuni gongur fyri seg millum landsst‡ri› og donsku stjórnina í sjálvsst‡rispurninginum, eins og teir høvdu ætla›.

Tí finnast teir í felags tí›indaskrivi vi› yvirskriftini »Huldumannaspæl um lagnu føroyinga« har›liga at framfer›ini hjá landsst‡rinum Teir vísa á, at ta› sambært løgmanni er avtala› spæl millum landsst‡ri› og donsku stjórnina, at samrá›ingarnar, sum nú fara fram, eru í trúna›i.

Í tí›indaskrivinum átala Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard hesi framfer›, og siga teir seg ikki kunna gó›taka, at landsst‡ri› og danska stjórnin samstarva um at halda okkara framtí›ar lagnu dulda fyri Føroya fólki.

Skulu hava innlit

Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen halda ta› vera eina sjálvfylgju, at fólki› fær at vita, hvat gongur fyri seg millum landsst‡ri› og donsku stjórnina, tí sambandi› sn‡r seg um fólksins framtí› og lagnu.

– Ein politisk skipan í árinum 2000 eigur at tola, at fjølmi›larnir sum ta› sokalla›a fjór›a statsvaldi, siga fólkinum frá, hvat politikarar teirra arbei›a vi›, siga teir.

Teir bá›ir andstø›ulei›ararnir vísa á, at løgtingi› hevur sett opinleikan í hásæti›, vi› ta›, at allar vi›ger›ir í løgtinginum ver›a varpa›ar út og lagdar á interneti›. Somulei›is vísa teir á, at nevdarskjølini frá løgtingsarbei›inum eru almenn.

Tí halda teir, at ta› ikki kann gó›takast, at landsst‡ri› og stjórnin føra politikk í sk‡maskotum um lagnuna hjá føroya fólki.

Ikki búgvi ›

Løgma›ur hevur fleiri fer›ir vátta›, at hann seinastu tí›ina hevur havt samband vi› danska forsætisrá›harran um n‡ggja sjálvst‡risleistin hjá landsst‡rinum. Hetta vátta›i hann seinast í grein í Sosialinum leygardagin.

Men løgma›ur vil ikki kalla samskifti› vi› danska forsætisrá›harran fyri samrá›ingar. Samstundis vil hann heldur ikki kalla samskifti› fyri óformelt prát.

– Talan er hvørki um samrá›ingar ella óformelt prát. Talan er um samskifti, sum hevur til endamáls at finna eina semju um n‡ggja leistin, seg›i Anfinn Kallsberg vi› Sosialin undan fundinum í uttanlandsnevndini fríggjadagin.

Løgma›ur sigur, at máli› í løtuni er á einum slíkum stø›i, at ta› ikki er búgvi til at ver›a almannakunngjørt. Men hann ger greitt, at tá ein avtala fyriliggur, skulu fjølmi›larnir fáa at vita, hvat avtalan inniber.

Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard halda ta› vera huldumannaspæl um lagnu føroyinga, at landsst‡ri› ikki vil kunna um sambandi vi› donsku stjórina um n‡ggja sjálvst‡risleistin

Eftirl‡sa tvørpolitiskum samstarvi

Ungmannafeløgnini hjá Javna›arflokkinum og Tjó›veldisflokkinum høvdu felags fund um vikuskifti›. Ni›urstø›an av fundinum var, at flokkar vi› felags grundsjónarmi›um eiga at mi›ja eftir brei›ari samstarvi

UNGDÓMSPOLITIKKUR
John Johannessen

Vælfer›arsamfelagi› stó› ovast á dagsskránni, tá Unga Tjó›veldi› og SU hildu felags fund í Nósloy fríggjakvøldi› og leygardagin.

Meiningin var, at fundurin skuldi vera ein ungdómspolitisk rá›stevna fyri øll tey politisku ungmannafeløgini í landinum. Men av tí, at bert ungmannafeløgini hjá Javna›arflokkinum og Tjó›veldisflokkinum, gjørdist rá›stevnan í sta›in til ein drúgvan fund millum hesi bæ›i feløg, umframt framløguna hjá Edvard Joensen, bla›manni, um politiskar ideologiir.

Eftirl‡sa semjum

Høvu›sni›urstø›an av fundinum var, at politisku ungmannafeløgini ynskja brei›ari semjur millum andstø›u- og samgonguflokkar vi› felags grundsjónarmi›um.

Tey bæ›i ungmannafeløgini halda, at føroyskir flokkar í alt ov stóran mun læsa seg fastar í partapolitisk sermál í sta›in fyri at finna brei›ar semjur um tey mál, sum flokkarnir grundleggjandi eru samdir um.

Sambært SU og Unga Tjó›veldinum læsa flokkarnir seg alt ov ofta í nakrar ávísar ósemjur, bert tí, at teir ikki eru í samgongu ella andstø›u saman.

Í Føroyskum politikki átti at bori› til at funni› ein leist, har bæ›i samgonga og andstø›a arbei›a eitt sindur meira saman um tey felags málini, sum man roynir at seta sær, halda tey bæ›i vinstrahalnu ungdómsfeløgini. Tey halda, at ta› eru nógv mál, sum ávísir flokkar í grundini eru samdir um, men sum teir ikki vilja samarbei›a um, tí andstø›an ikki vil stu›la samgonguni og samgongan ikki vil arbei›a saman vi› andstø›uni.

Ungdómsfeløgini vísa á, at ta› sjálvsagt eru mál, sum til dømis Tjó›veldisflokkurin og Javna›arflokkurin ikki eru samdir um, men tey halda ikki, at hetta eigur at merkja, at flokkarnir ikki eiga at leggja seg eftir at samstarva um tey málini, sum teir í veruleikanum eru samdir um. Og í hesum føri halda feløgini, at talan kann vera um rættuliga nógv mál, tí flokkarnir eru grundleggjandi samdir um, hvussu eitt vælfer›arsamfelag eigur at ver›a skipa›.

SU og Unga Tjó›veldi ætla í framtí›ini at mi›ja ímóti størri samstarvi í teimum málum, sum hesi bæ›i feløgini eru samd um.